**Tíðargreinin: eitt íkast til føroyska orðaskiftið**
Hevur tú hug at gera títt íkast til føroyska kjakið í 2008?
Send eina grein til dorit@sosialurin.fo
Kravið er, at greinin er millum 8.000 og 10.000 tekn og skrivað í essay stíli

**Næstu ferð**: týsdagin 29. januar,
Birgir Kruse: Heimleys vitan



# POST FESTUM

*Akilleus-hælurin hjá farnu samgongu – ein læra fyri framtíðina?*



TÍÐARGREININ
*Hanus Kamban*
*rithøvundur*

Dagin eftir orrustuna liggur kavi, taktur við skróvandi skara, í brekkum, á tøkum og á gongubreytum. Hann veksur vindin, og í rúminum hvirla lodnar flykrur. Á buss-skýlum og lyktarpelum flagsa leivdir av valplakatum, sum nipnar spjarrar, og á stikum, gørðum og árendum vegamótum standa stórar finerplátur - haðani fotomyndirnar av landsins flogvitugu ikonum eru burturskræddar - og gapa. Kenslan av at koma til Waterloo *post bellum* nemur við ein, og eitt gamalt vísuørindi rennur einum til hugs:

*De fruer de stande i højeloft,*
*de vente deres herrer at komme;*
*hestene de komme blodige hjem,*
*og sadlerne de ere tomme.*

Kanska kann tað vera hóskandi, nú tøgnin valdar, og mangir vísir knokkar eru lagdir í blot, at bera fram nakrar leysligar hugleiðingar um nakrar tættir í politikkinum tað farna fýraára skeiðið.

At fólkaflokkurin og javnaðarflokkurin fóru at kasta saman aftaná fýra ár við fullveldispolitikki, nógvum retorikki og fáum veruligum úrslitum, var greitt longu stutt eftir aldarskiftið. Hesir flokkar eru tann pragmatiska miðleingjan í føroyskum politikki, og eisini har tað snýr seg um ta hóvligu gongdina fram ímóti øktum sjálvræði, megna teir, betur enn fullveldisflokkar, at fremja framstig. Og tað skal sigast hesum flokkum til rós, at teirra umboð í okkara stjórn, eitt nú Bjarni Djurholm og Hans Pauli Strøm (fyri bara at taka tvey dømir), tykjast at hava arbeitt seriøst og at hava avgreitt mong týðandi mál. Sum dømi um virkið hjá tí fyrra kundi ein nevnt t.d. flogvallarmálið.

### Fjølmiðlarnir

Í hesum sambandi er tað áhugavert at hyggja at fjølmiðlanna leikluti. Hesir miðlar, sum í fýra ár dyrkaðu, ikki sjáldan í ókritiskum og undirbrotligum jasigaraanda, tann ofta tóma retorikkin hjá fullveldissamgonguni, hava – ikki altíð, men í stóran mun – hugt hinvegin, nú okkara ráðharrar veruliga hava *arbeitt*.

Á Landssjúkrahúsinum hevur ein tvídráttur fyri og annar eftir tikið seg upp, millum starvsbólkar, seinast millum sjúkrasystrar og jarðarmøður. Men í seinastuni hevur verið tøgn og friður. Hvør er orsøkin? Kundi tað hugsast, at ein orsøk er, at her hava fólk lagt uppí, sum bæði hava havt vilja, evnir og fantasi – konstruktivt, visionert hugflog – til at síggja loysnir, til at stilla trætur og kyrra tvídráttir? Og at tað hevur lukkast teimum?

Onnur dømir eru leigulógin og lutafelagslógin. Tá ið uppskot til hesi nýbrot komu fram, spruttaðu miðlarnir ófort. Tá ið sambandið sleit samgonguna, og hesar tilgongdir fyribils vórðu av ongum, hoyrdist einki kis. Í einumhvørjum landi við einum veruligum, búnum fjølmiðlaheimi, hevði tað verið sjálvsagt, at hesi mál blivu lýst, ikki ókritiskt, men á seriøsan hátt, við at spurt varð – í viðgerðum við analýtiskum *feature*-dámi - hvussu støðan var fyrr, og hvørjar møguleikar hesi lógarframstig kundu havt við sær. Men hvørja styrki okkara fjølmiðlaheimur annars hevur, analýsan og tann prinsipiella viðgerðin tykjast ikki at vera hansara næsti granni.

### Skattalættin

Veruleikin tykist at vera, at teir tríggir flokkarnir, sum hava myndað ta farnu samgonguna, hava havt ikki fá dugnafólk at umboða seg í stjórn. Hyggja vit at eitt nú tjóðveldinum, so eigur hesin flokkur eisini mong gávurík fólk, men samstundis tykist greitt, at í mongum førum rúgvar orðabraskið meira upp enn tann grái, gerandisligi førleikin.

Tað er ikki lítið sigandi, at ein av teimum fáu tjóðveldispolitikarunum, sum hevur megnað at lyft ein ráðharrasess, bleiv trokaður burtur av sínum egnu og enntá fekk eitt eyknevni heft at sær afturfyri sítt strev. Men álvaratos – landsins trupulleikar verða ikki greiddir "oman fyri hálsvølin".

Samstundis eigur ein at ásanna, at andstøðan hevur havt rætt í nøkrum atfinningum. Og tað er yvirhøvur ein grundregla, at ein og hvør stjórn kann koma sera illa fyri, um hon ikki, samstundis sum hon fremur sín egna politikk, lurtar eftir síni andstøðu. Fullveldissamgongan kollsigldi, tí hon gloymdi at geva andstøðuni gætur, og í reinari hugmóð ikki gáaði eftir, at hon ikki hevði stuðul í fólkinum. Ein orsøk til samgonguslitið stutt fyri jól var eisini, óbeinleiðis, vantandi virðing fyri andstøðunnar sjónarmiðum um búskapin.

Tann mest álvarsami veikleikin hjá tí farnu samgonguni, sum bæði tjóðveldið og serliga tann ábyrgdarfulli og seriøsi Karsten Hansen (nú í miðflokkinum) hava víst á, er nevniliga búskapar- og fíggjarpolitikkurin. Landsstýrið hevur, sum vit vita, tey seinastu fýra árini ført ein rættiliga víðgongdan skattalættapolitikk. Vit kunnu í hesum sambandi spyrja: Var hesin politikkur neyðugur? Hevur hann gagnað landsins vinnulívi? Hevur hann gagnað landsins búskapi? Hevur hann økt um landsins gjaldføri? Hevur hann gagnað tí einstaka?

### Milliardirnar sum hvurvu

Svarið upp á allar hesar spurningar tykist at vera stutt og greitt: nei. Føringar hava (tá tey lægstløntu eru undantikin) tey seinastu árini vassað í pengum. Umframt tað er skattalættin so smábýttur, at hann als ongan mun hevði gjørt, hóast hann hevði verið neyðugur. Fara vit til landsins búskap, so hevur skattalættin minkað um gjaldførið og gjørt, at landið, í tíð við hákonjunkturi, lítið og einki hevur sett til síðis.

Um fólk sum heild er at siga, at tey hava ikki vitað, hvat tey skuldu gera við alt avlopið. Skómakarar hava rópt neyðarróp, tí vanlig fólk nú liva í slíkum luksusi, at tey tíma ikki at koma eftir sínum (sum eg kann vátta av egnum royndum) væl og virðiliga bøttu skóm og styvlum. Summi hava gjørt marglætisferðir til Skotlands fyri at sleppa av við sína yvirflóð. Men grundin undir føroyskum búskaparligum støðufesti verður ikki løgd í stórhandlunum í Aberdeen.

Tann spurningur, sum ongin politikari hevur torað ella megnað at spurt, er hesin: Hvussu nógv hevði okkara land átt í dag, um ein ábyrgdarfullur búskaparpolitikkur, við ongum skattalætta, hevði verið førdur? Siga vit, at skattalættin fyri hvørt ár er 250 milliónir, er úrslitið: ein milliard. Leggja vit tey burtursøplaðu fiskiloyvini aftrat, koma vit upp á: *tvær milliardir*.

Hetta talið (sum kann vera nakað minni ella nakað størri) er áhugavert. Sótu fólk við skili á fíggjarpolitikkinum, høvdu Føroyar í dag átt 2 milliardir, at seta í ein búskapargrunn ella at rinda ymiskar verkætlanir við. Men hesar milliardirnar eru, takkað veri einum skilaleysum fíggjarpolitikki, farnar líkst niður ímillum skins og hold.

### Hvør er ímóti tunlum?

Latið okkum nú, við hesum skattalættapolitikki *in mente*, hyggja at t.d. tunnilsætlanum. Um eina av hesum ætlanum, Sandoyartunnilin, hevur verið ein øgiligur goragangur undan valinum. Ja, ein fólkavaldur politikari hevur enntá – tá ein borgari brúkti sín demokratiska rætt til at siga sína hugsan um hetta mál – hótt viðkomandi borgara og kravt, at hann misti sítt starv. Ein hómar snýðið á Stalin ella Ceaucescu.

Men tað skemtiliga er, at skattalætti og tunnilsbygging kunnu ikki sameinast. Ella sagt øðrvísi: ein politikari, sum tekur undir við skattalætta ella hoyrir til ein skattalættaflokk, er altíð, so kann hann siga hvat hann vil, *í verki* ímóti tunnilsgerð. Vit síggja hetta týðiliga, um vit hyggja at teimum 2 milliardunum, sum hetta landsstýrið hevur søplað burtur, púra óneyðugt. Fyri ein triðing av hesi burturblakaðu upphædd kundi Sandoyartunnilin í dag, áðrenn ein einasti borur varð settur upp, havt verið goldin kontant.

### Tann komandi ístíðin

Latið okkum nú, fyri at síggja viðurskiftini í okkara mikro-

*Framhald á næstu síðu*



*Progressiv skatting skapar ríkidømi. Millum løgmann og Magna Laksafoss: amerikanski búskaparfrøðingurin Paul Krugman*

Tíðargreinin